# Tankar á Káta Horni

**Sjálvmorð, kríggj, løgin kærleiki og eitt sindur av hvørjum. Soleiðis var skráin til triðja punktið av Licentia Poetica skrúvað saman á Káta Horninum klokkan 16 ólavsøkudag**

## Yrkingar



**Eirikur í Jákupsstovu**
blaðmaður
eij@sosialurin.fo

Inni í Tutl Handlinum á Káta Hornið brustu yrkjarar og sangarinna saman ólavsøkudag klokkan 16.

Hvønn dag skipar Tutl fyri konsertum í handlinum, men hesa ferð var skaldsliga frælsið eisini umboðað.

Guðrið Hansdóttir slapp fyrst framat við sínum tónleiki, áðrenn fýra ungir yrkjarar sluppu framat.

Bárður Persson, Vagnur Streymoy og Ludvík Breckmann vóru føroyska íkastið, meðan danska íkastið kom við Lasse Thorning, sum er Danmarksmeistari í nøkrum so serligum, sum poetry slam, sum vanliga verður skipað sum ein kapping.

### Sjálvmorð og kríggj

- Eg fari at lesa tvær yrkingar, sum eg skrivaði fyri nøkrum árum síðan. Tað vísir seg, at nógvar av yrkingunum hjá mær tá, høvdu okkurt sjálvmorð innvolverað, segði Bárður Persson, áðrenn hann las tvær yrkingar úr blaðnum Vencil.

Hann greiddi frá um ein mann, sum onkursvegna hevði eitt serligt forhold til eina flugu, samstundis, sum endin av lívinum og aðrar daprar myndir onkursvegna vóru at hóma millum singlirnar og Ip'irnar í Tutlhandlinum á Káta Hornið.

Lítla løtu seinni slapp ein annar av yngru yrkjarunum, Vagnur Streymoy, framat.

Hann las somuleiðis nakrar av yrkingunum hjá sær, sum allar hava verið prentaðar í ritinum Vencil. Hesar rukkur rímiliga langt inn í Vagn Streymoy, og vóru eisini onkursvegna afturlítandi til søguligar hendingar og annars ósemjurnar, sum so ofta eru.

### Káti Ludvík

- Eg fari at lesa úr mínum næsta yrkingasavni, sum kemur út, so skjótt eg fái studning til at geva tað út.

Ludvík Breckmann var triði av yrkjarunum, ið slapp framat. Við serligum myndum frá veruleikanum. Alt frá tí ólukkuliga til tað fantastiska bar Ludvík Breckmann fram við einum skálkasmíli á ein rættiliga prædikukendan hátt.

### Poetry slam

Lasse Thorning er Danmarksmeistari í Poetry slam. Hetta plaga at vera eitt slag av kapping, og talan er um framførslur, sum liggja onkustaðni ímillum upplestur og rapp.

Við sær hevði danin eitt upptøkutól, sum hann sang og tivaði ljóð inná, sum hann síðani spældi, meðan hann gjørdi onnur ljóð, og las yrkingar, sum hann fann uppá allan vegin.

Hann endaði síðan við at syngja ein sang saman við upptøkutólinum/avspælaranum.

Og so slapp Guðrið Hansdóttir aftur framat.

### Verður gjørt aftur

Oddfríður Marner Rasmussen, sum er ein av monnunum handan Vencil, sum saman við Føroya Fólkaháskúla, greiðir frá, at hetta heilt víst er eitt tiltak, sum verður gjørt aftur.

- Undirtøkan hevur verið rímilig, og ein av komandi døgunum fara vit at seta okkum saman at finna útav, hvussu vit gera komandi ár. Kanska skulu onkrar broytingar gerast, men vit fegnast heilt víst um tað, sum hevur verið, sigur hann.

Um yrkingarnar sjálvar fegnast hann um støðið, og vísir á, at yrkjararnir í Føroyum eru rættiliga ymiskir.

- Teir yngru yrkjararnir tosa nógv inneftir, meðan eldru yrkjararnir síggja tingini á ein eitt sindur øðrvísi hátt. So eg dugi ikki ordiliga at síggja, um nakað er serligt við føroyskum yrkjarum.

Ólavsøkuaftan vóru yrkingar lisnar á háskúlanum og við standmyndina, Tarira, meðan tað í gjár vórðu lisnar yrkingar á Káta Hornið og við grøvina hjá Jørgen Frantz Jacobsen.





